# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Hjørdis Djurhuus 95 ár



Í gjár, mikudagin 27. apríl, fylti Hjørdis Djurhuus í Havn 95 ár. Ivaleyst eru tað fleiri - ikki bara í eldra ættarliðnum - sum komast við Hjørdis, sum so hendinga áhugavert segði frá barna- og ungdómsárunum í útvarpinum á jólum.

Hjørdis er ættað úr Havnini. Foreldrini vóru Hans Kamban, sum var lærari í Havnini og ættaður úr Skúvoy, og Marie, fødd Ziska, fødd í Vági og uppvaksin í Havnini. Børnini hjá teimum vóru Bette, sum var gift við Peturi Andreasen, Hjørdis, Hanna, sum var gift við Franklin Ziska í Klaksvík, Janus, Ebba, sum er gift við Eriki Petersen, Kristoffur, sum doyði heilt ungur, og Marius, sum sigldi og búði í Svendborg, og var giftur við Elini, ið var hálvføroysk. Eftir á lívi eru Hjørdis, Janus Kamban, listarmaður, og Ebba. Tey búgva øll í Havnini.

Sum ung genta stóð Hjørdis í krambúð, til hon í 1929 fór á læraraskúlan, har hon leyk prógv í 1932.

10. juli hetta sama summarið giftist Hjørdis við floksfelaganum á læraraskúlanum, Hákuni Djurhuus, sum var ættaður úr Skúvoy. Hann var lærari og seinni í sóknarstýrinum í Klaksvík, løgtingsmaður fyri Norðoyggjar, landsstýrismaður, fólkatingsmaður og løgmaður umboðandi Fólkaflokkin. Onkuntíð var Hjørdis í skúlanum fyri mannin, tá ið honum barst frá, men luturin hjá henni gjørdist at taka sær av manni, børnum og heiminum, har nógv ferðsla var, eisini orsakað av politiska arbeiðnum hjá manninum.

Tvey tey fyrstu árini eftir, at tey høvdu fingið prógv, var Hákun ferðalærari Innan Glyvur og í Skálafirði. Í 1934 varð Hákun Djurhuus settur í lærarastarv í Klaksvík, og í tí starvinum sat hann, inntil hann í 1976 fór frá vegna aldur.

Hjørdis og Hákun bygdu á Ziskatrøð í Klaksvík. Tey fingu sjey børn: Hjarnar, Tormóður, Annika, Malan, Kristin (doyði hálvt ára gomul), Jógvan Heindrikur og Kristin. Jógvan doyði í uttanlandssigling í 1973. Hini børnini búgva øll í Havnini.

Tá ið Hákun var komin upp í politiska arbeiðið og tískil var nógv í høvuðsstaðnum, og børnini vóru flogin, flutti Hjørdis aftur til Havnar. Hon og Hákun búsettust á Skansavegi, og har býr hon framvegis. Hjørdis hevur altíð lisið nógv, hon hevur avbera gott minni, og hon er serliga kunnug í føroyskari og norðurlendskari søgu. Hon fylgir væl við í samfelagsviðurskiftum, hon hevur ofta tikið til pennin, og tað er ikki so ógvuliga langt síðani, at hon seinast var við í almenna orðaskiftinum.

95 ára føðingardagin helt Hjørdis saman við sínum næstu.



## Aftur á ting

Á tingfundi ígjár tók Dánial Petur Hansen sæti á tingi fyri Kára P. Højgaard, sum fer uttanlands í samband við Norðurlandaráðsfund.

Dánial Petur hevur fyrr umboðað Sjálvstýrisflokkin á Løgtingi.

## Magnus Pauli Poulsen 50



Mikudagin 27. apríl fylti ein nokkso kendur havnarmaður 50 ár. Tað er Magnus Pauli Poulsen, ella betri kendur sum Maggi.

Aftaná lokna skúlatíð í Hoydølum var hann eina tíð í Danmark og royndi onkra skúlagongd, men tók so avgerðina heldur at fara sjóvegin. Skiparalærdur fór hann út í stóru verð og hevur tað nógvu árini verið hansara lív.

Innan tónleikalívið hevur hann óivað verið ein av stóru drívkreftunum í landinum og var ein av fremstu tónleikarum í Spælimonnunum í Hoydølum. Hollur vinur, stórskemtari, gávuríkur og heimspekingur.

Maggi eigur tvey børn saman við Maluni av Eiði.

Hjartaliga tillukku, vinurin.

**Landavegskúllar**

**Tøkk**

Øllum tykkum, sum vístu samkenslu, tá

**John Nolsøe**
**av Tvøroyri**

doyði og fór til gravar, takka vit hjartaliga.
Tøkk til tykkum á Psykiatriska Deplinum, sum hava verið um hann øll árini, hann búði har.
Tøkk til prestarnar og organistar í Havn og á Tvøroyri, sangarar, kirkjutænara og gravara á Tvøroyri.
Tøkk til øll tykkum, sum vóru til minningarhald í kapellinum á Landssjúkrahúsinum og sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.
Hjartaliga tøkk fyri gávur til Sinnisbata.

*Familjunnar vegna*
**Marna, Kaj og Knút**

# Fyrsti skúlaflokkurin í Miðlahúsinum




Í farnu viku hevði 7. flokkur í Fuglfjarðar skúla vitjan av einum flokki úr Suðavík í Íslandi.

Hesi børnini gjørdu mangt áhugavert saman, og vóru tann eina dagin eisini ein túr í Havn. Har hittu tey m.a. mentamálaráðharran, Jógvan á Lakjuni, ið sjálvur er fuglfirðingur og vitjaðu onnur kend støð.

Sum ein part av skránni vitjaðu tey eisini á Miðlahúsinum í Vágsbotni, hagani henda myndin stavar.

Síðani Sosialurin flutti í nýggju hølini í Vágsbotni, hava nógv fólk verið á vitjan. Men hetta var so fyrsti skúlaflokkurin.

**Tøkk**

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt vístu okkum samkenslu og stuðul tá okkara elskaði sonur



**Jens Harry Sakarisson Dimon**
f. 26. oktober 2004 – d. 10. februar 2005

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til starvsfólkini á skaðastovuni
og prestin Bergur D. Joensen
Kirkjutænarar, sangarar, berarar, gravara og øllum tykkum, sum hjálptu okkum á annan hátt.
Tøkk til Malan Thomsen, Finnur Hansen
og Edward Nyholm Debes fyri vakra sangin í kirkjuni.
Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur.
Tøkk til tykkum mongu, ið fylgdu honum
til hansara síðsta hvíldarstað.

**Sakaris og Beinta**